**Fylgiskjal 6**

## Skjalatilfar viðvíkjandi trygd, arbeiðsumhvørvi, umhvørvi, tøknifrøði og tilbúgving

Umsøkjarin skal lýsa krøvini, ið hann setir til trygd, arbeiðsumhvørvi, umhvørvi, tøknifrøði og tilbúgving.

Í umsóknartilfarinum skal umsøkjarin skjalprógva førleika og royndir viðvíkjandi boringum á økjum, ið kunnu samanberast við útboðsøkið í hesum útbjóðingarumfarinum.

Skjalatilfarið skal lýsa krøv viðvíkjandi trygd, arbeiðsumhvørvi, umhvørvi, tøknifrøði og tilbúgving og skal leggja dent á viðurskiftini í litra a-f:

a) Politikkur umsøkjarans í samband við boringar á djúpum sjógvi.

b) Áskoðan umsøkjarans á avbjóðingar og lyklaspurningar viðvíkjandi virksemi í føroyskum sjógvi.

c) Stýrisskipanir umsøkjarans fyri stýring av váða í samband við boringar.

d) Krøv umsøkjarans til upplæring og hvussu starvsfólkið verður tikið við í ráðlegging og útinning av borivirksemi.

e) Umhvørvisskjalatilfarið skal innihalda:
   1) eina heildarlýsing av umhvørvinum í økinum, sókt verður um,
   2) eina lýsing av møguligum árinum, ætlaða virksemið kann hava á umhvørvið,
   3) umhvørvisskipanir, sum ætlanin er at nýta í føroyskum sjógvi t.d. ISO 14000, EMAS o.s.fr. og
   4) hvørji verjutiltøk ætlanin er at seta í verk fyri at minka um vandan fyri umhvørvisdálking.

f) Lýsing av tøkniligum førleika og evnum at menna myndlar fyri leiti- og framleiðslu-virksemi á økinum, søkt verður um.

Tað kravda skjalatilfarið skal lýsa veruligu umstøðurnar á økinum, sum umsóknin fevnir um.

Verður søkt i felag, skal hvørt einstakt felag útvega skjalatilfar til krøvini, ið eru ásett í litra a-f omanfyri.

Virksemi í føroyskum sjógvi krevur, at fyristøðufeløgini hava eina leitingar- og bjargingartyrlu umframt útgerð viðvíkjandi upptaki av oljudálking standandi tøka í Føroyum, meðan leitivirksemi fer fram.